# Hvør átti lygnina, Tórbjørn Jacobsen?



EIRIKUR LINDENSKOV
Blaðstjóri

**Tað var ikki sørt áhugavert at hoyra sendingina 62 norður í útvarpinum í gjár, har Kringvarpið setti kikaran á trúvirðið hjá Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmanni og Tjóðveldisflokkinum, sum hevur kosið sær tann so mangan umstrídda eysturoyartingmannin til næstformann**

Framferðarháttin hjá tingmanninum nýtist okkum ikki at viðmerkja her, men sum partur í einum máli, har hann var høvuðspersónur, kundi eg hugsað mær at fingið svar frá bæði formanni og næstformanni Tjóðveldisfloksins.

Tað var tann 20. november í 2000, at Sosialurin vendi sær til Tórbjørn Jaocbsen, sum var landsstýrismaður í mentamálum. Ørindini vóru at frætta nærri um avgerð hansara um at avtaka grundlógardagin sum frídag hjá skúlunum og í staðin lata skúlarnar hava frí altjóða arbeiðaradagin, 1. mai. Løgmaður Anfinn Kallsberg var ikki glaður fyri hesa avgerð, og kravdi tí, at landsstýrismaðurin broytti avgerðina.

Tað var tá, at Tórbjørn Jacobsen brúkti orðini "danskur leigusveinur" um Anfinn Kallsberg.

Sjálvandi bóðu vit løgmann um viðmerking til hetta, og so var eldur í.

Nú fór propagandamaskinan hjá Høgna Hoydal rættiliga í gongd. Hann ringdi ótaldar ferðir til blaðmannin, til Jústinus Eidesgaard, sum var tíðindaleiðari og til mín sum blaðstjóra og bað og bønaði um, at greinin ikki kom á prent.

Hesum kundu vit sjálvandi ikki eftirlíka, tí blaðið var farið til prentingar, og at fara at steðga eini útgávu, tí at ein landsstýrismaður ikki dugdi fólkaskikk, tað var ikki okkara uppgáva.

Høgni Hoydal bleiv við í tímavís – við øllum triksum. Spurdi um eg "sum ein kammeratur" ikki kundi gera hetta, tí hetta fór at hava so stóran týdning fyri samgonguna.

Men blaðið var farið til prentingar, og harvið var tað.

Síðani kom Tórbjørn Jacobsen sjálvur út á redaktiónina á Argjum. Henn settist við mína teldu, læs greinina og váttaði, at hann hevði sagt hesi orðini – og at vit einki skeivt høvdu gjørt. Hann var sera blíður og vinarligur – og segði okkum, at hansra politiska lagna lá í okkara hondum, tí tá hann kom niðan aftur í mentamálaráðið, lá uppsøgnin á borðinum. Men, segði hann. Skuldin var hansara egna.

Vit báðir Jústinus og eg tóku beinleiðis synd í honum.

Men so gongur seinnaparturin – og so kemur eitt tíðindaskriv frá Tórbjørn Jacobsen – sent frá telefaxinum hjá Høgna Hoydal í Tinganesi – í teirri tíðini dugdu vit telefax nummur uttanat eins væl og teldupostadressur í dag.

Vit vistu, at Tórbjørn Jacobsen sat í bilinum á veg inn á Skálafjørðin, tí vit tosaðu við hann fleiri ferðir í fartelefon. Men hugsaðu kortini, at Høgni Hoydal mundi hava skrivað telefaxið í samráð við Tórbjørn – undirskrivtin var so tann hjá Tórbjørn Jacobsen.

Men tíðindaskrivið var ein løddrøtt, kolasvart lygn, sum tíbetur fyri okkum var avdúkað í Degi og Viku dagin eftir

Í tíðindaskrivinum frá Tobba stendur m. a.

*»Í Sosialinum 22. nov. er ein stórt uppsett grein, har undirritaði verður siteraður fyri at skíra løgmann, Anfinn Kallsberg at vera "leigusveinur" hjá donsku stjórnini.*

*Undirritaði hevur ongantíð brúkt hetta orðið um løgmann og kundi eiheldur nakrantíð funnið upp á tað...«*

Vit hava ongantíð fingið svar upp á, hvør skrivaði tíðindaskrivið. Í 2004, tá Tórbjørn Jacobsen og Høgni Hoydal klandraðust illa, segði Tórbjørn Jacobsen í einum lesarabrævi, at Høgni Hoydal skrivaði eitt tíðindaskriv upp á nakkan á sær.

Eingin ivi er um, at tíðindaskrivið bjargaði Tórbjørni landsstýrissessin.

Við øðrum orðum var Tórbjørn Jacobsen bjargaður við eini kolasvartari lygn, har Tjóðveldisflokkurin á ein ómansligan hátt turkaði eitt mistak upp á ein journalist.

Spurningurin mín er: Hvør átti lygnina?

Var tað formaður Tjóðveldisfloksins ella næstformaðurin?

Eg royndi at ringja inn til útvarpið fyri at seta Tobba hendan spurningin, men kom ikki ígjøgnum.

Nú Tórbjørn Jacobsen sjálvur á henda hátt hevur kveikt lív í málið av nýggjum, haldi eg tað vera rætt av teimum at lýsa alt málið - og at siga okkum, hvør átti lygnina, Tórbjørn Jacobsen ella Høgni Hoydal...


Sosialurin
Nr. 225 • mikudagur • 22. november 2000 • 74. árgangur • Kr. 10,00

ítróttur
Hondbóltslandsli›i›:
Rúni hevur givi› avbo›
www.sosialurin.fo

Fólk vald í 48 kommunust‡ri

7. flokkur endurn‡tir pappír
Sí›a 8-9

Fullveldi um nøkur fá ár
sí›a 5

Tórbjørn Jacobsen, landsst‡risma›ur:
Løgmaður er danskur leigusveinur

– Sleppi eg ikki at føra mín egna politikk, so r‡mi eg, sigur Tórbjørn Jacobsen. Sambært honum hevur danski forsætisrá›harrin givi› løgmanni bo› um at krevja av Tórbjørn Jacobsen, at hann letur vera vi› at avtaka grundlógardagin sum frídag hjá skúlunum
Sí›a 7

Sig tað bókstaviliga
Send SMS tekstboð um fartelefonina fyri einans 0,90 kr.
Nýggja SMS-støðin hjá Føroya Tele hevur nummar +298 24 90 20. Tasta nummarið inn í tína fartelefon og tú kanst senda og móttaka tekstboð...
FØROYA TELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo

Heimas ur
Framkomnar web-loysnir
www.vit.fo
Undir Bryggjubakka 17
FO-100 Tórshavn
Tlf. 319914

Sp/f VVS-HORNIÐ
Lágprishandil
Alt innan hitaverk & sanitet so sum:
• Stoypijarnsketil
• Sanitet
• Kranar
• Baðirúmsmøblar
Støkk inn á gólvið ella ring
Landavegur 2 - 100 Tórshavn
Tel. 318023 - Fax 310963

Nýggir bóklingar
Kom inn og fá Føroya snøggasta bókling. Alt um, hví tú fært tað munandi betri hjá HTH og 148 síður við køksinspiratiónum.
...tú fært tað munandi betri hjá HTH
HTH Køksmiðstøðin

*Hetta var forsíðan á Sosialinum, sum kom út um kvøldið tann 21. november í 2000. Hóast Tórbjørn Joacbsen var úti á Argjum á Sosiainum og læs greinina ígjøgnum - og váttaði, at hann hevði skírt Anfinn Kallsberg fyri »danskan leigusvein«, so sendu hann og Høgni Hoydal kortini út eitt tíðinaskriv, har alt varð avsannað - og lygnin hjá teimum varð turkað upp á blaðið og journalistin. Útvarpið viðgjørdi trúvirðið hjá Tórbjørn Jaocbsen í sendingini 62 Norður í gjár. Tað hevði tí verið hóskandi, at Høgni Hoydal og Tórbjørn Jaocbsen greiddu Føroya fólki frá, hvør átti lýgnina, sum bjargaði Tórbjørn Jacobsen landsstýrissessin ta ferðina*

# "Uttanlanda í vikuskiftinum"



SONNE SMITH
fjølmiðlamaður

Kanska er tað eina roynd vert aftur at royna at pjøssa upp á tað føroyska málið, sum nú líkist so nógv sirkusdonskum, at nýføroyskt er vorðið ein sirkusdonsk dialekt.

Vit hava altíð sagt: um ársskiftið, um mánaðarskiftið. Vit hava ongantíð sagt: í ársskiftinum, í mánaðarskiftinum. Kortini eru flestir føroyingar farnir at siga: í vikuskiftinum. Logiskt ber tað rætt og slætt ikki til. Og so er tað so sirkusføroyskt, at tað beinleiðis argar.

Spurningurin er: Hvussu ber tað til, at vit føroyingar ikki bara siga tað, sum tað eigur at verða sagt: um vikuskiftið?

Kanska hjálpir tað at siga, at í vikuskiftinum er barnamál, sum als ikki hoyrir heima í fjølmiðlunum, haðani henda ónolla er sprottin.

Hin ónollan í yvirskriftini, uttanlanda er ein týðilig ábending um, at tá ið fólk hiðani eru í útlondum, so eru tey við hvørt í fleiri londum. Tí halda tey tað vera logiskt at siga, at tey eru uttanlanda. Men tað logiska við hesum orðið er, at hóast tú ert í 140 londum, so ert tú UTTANLANDS, tí tú er ikki heima, tað er í landinum Føroyum.

Tað eitur sostatt bara og einki annað enn UTTANLANDS.

Við ómakskvøðu

## Hvør eigur fólksins ogn?



HELGI ABRAHAMSEN

Tummas Justinussen, reiðari, gjørdi í samrøðu við Sosialin í farnu viku viðmerkingar til málið um Atlantic Navigator og um fiskivinnupolitikkin yvirhøvur. Samrøðan avdúkar, at hann hevur ikki sett seg nóg væl inn í uppskotini, sum eru komin frá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, men tað skal eg ikki koma inná í hesum samanhanginum.

Tað sum harafturímóti fær meg at gera hesa viðmerking, er tað sum hann sigur um eina ávísa skipasølu, har eg haldi, at hann blandar tingini saman.

Tað er avgjørt ikki mín fatan, at føroyingar eru ímóti, at reiðarar fáa ein fíggjarligan vinning, tá teir, aftaná nógv ár í vinnuni, selja síni skip. Hetta er lønin fyri at hava brúkt pengar, átikið sær váða og fyri krevjandi arbeiði í nógv ár. Tað er ikki tað, sum fólk hava so nógv ímóti.

Men við í søluni er ein annar partur, sum kallast fiskiloyvi. Henda partin hevur reiðarin fingið fyri einki. Hann hevur ikki brúkt pengar, ikki átikið sær váða og hevur heldur ikki arbeitt fyri henda partin. Tá reiðarin so selur loyvið fyri eitt virði, sum kann vera størri enn virðið á skipinum, tá er tað at fólkið talar at.

Vit kunnu vera ósamd um landið skal lata fiskiloyvini fyri einki, ella um tey skulu seljast. Men tað er umráðandi at tað er líka í báðum endum. Um reiðarin skal kunna selja loyvið fyri pengar, so má hann eisini keypa tað fyri pengar. Skal hann harafturímóti fáa tað fyri einki, so má hann eisini lata tað frá sær aftur fyri einki.

Vit eru í løtuni í teirri løgnu støðu í Føroyum, at tann einasti, sum ikki kann selja fiskiloyvi fyri pengar, er tað almenna. Øll onnur sum eiga eitt loyvi kunnu selja tað, og stinga pengarnar í lumman. Men tað almenna skal lata alt sítt fyri einki.

- Og hetta kalla vit "fólksins ogn".